# MjúS visti ikki, at Saybia samráddist við suðuroyingar

**Sambært Katrini Petersen talskvinnu fyri MjúS, vistu tey einki um, at Jóansøkufestivalurin hevði havt samband við Saybia um at spæla har, tá avtalan var gjørd við danska bólkin**

FESTIVALAR

*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*

Tróndur Enni fanst í Planet blaðnum, ið liggur í hósdags-Sosialinum, harðliga at fyriskiparunum av MjúS fyri at hava víst ljótan atburð við at bjóða Saybia meira pening enn Jóansøkufestivalurin hevði bjóðað fyri at fáa bólkin at spæla hjá sær.

Tróndur Enni finnist eisini at MjúS fyriskiparunum fyri at hava lagt festivalin á Jóansøku. Katrin Petersen vísir á, at tá tey valdu dagfestingina á MjúS, lá einki tónleikatiltak í Suðuroy. Tey vistu, at jóansøka var, men mettu, at ein oyggjarstevna og ein tónleikafestivalur væl kláru at deila eitt vikuskifti. Hetta visti seg eisini at vera rætt mett, sigur Katrin. Tí Jóansøkuhaldið í Suðuroy var sambært Sosialinum sera væl vitjað.

Nógv tiltøk vóru kring landið jóansøkuvikuskiftið. Millum annað var heimskendi gospelsangarin Russ Taff í Føroyum hetta vikuskiftið og hevði tvær konsertir. Katrin Petersen skilir ikki, at tað skal vera so nógv »ljótari« at gera eitt tónleikatiltak á Sandi enn í Havn og Runavík. Hon undrast tí, hon hevur ikki hoyrt eitt øvugt orð frá Tróndi Enni um tey, sum fingu Russ Taff til Føroya.

Hon heldur tað er sera harmiligt at hoyra henda tónan brúktan um MjúS - og púra óneyðugt eisini. Tí bæði Russ Taff-konsertirnar, MjúS og tiltakið hjá Tróndi Enni fingu góð skoðsmál í bløðunum, og allir fyrireikarar søgdu seg vera nøgdar.

Tróndur Enni segði við Planet, at tað er tápuligt at skapa sovorðið klandur, og at vit hava ikki brúk fyri split á føroyska tónleikapallinum. Hesum er Katrin Petersen samd í. Hon sigur, at føroyski tónleikapallurin hevði onga ætlan um at fara til Suðuroyar á jóansøku - Har var onki tónleikatiltak! Ikki fyrr enn tíðindini frættust, at teir 1500 íbúgvarnir í Sandoynni ætlaðu at savna allar kreftir at fáa oynna við í føroyska tónleikalívið, og bjóða teirra serstaka umhvørvi fram sum pall.

Katrin Petersen sigur harumframt, at Tróndur Enni sjálvandi kann halda, at sandingar eru »øgiliga ljótir« - men heldur, at bæði Sosialurin og Tróndur sjálvur eiga at síggja, at sovorðið orðalag á prenti er hinumegin markið fyri sømiligum úttalilsum.

# FM í Settlers

SPÆL

Settlers er eitt spæl, ið nógv hava tikið til sín her í Føroyum - bæði ung og gomul. So nógv, at nú verður tikið stig til eitt føroyameistaraskap í Settlers.

Vinninganir eru ikki at forsmáa: nummar 1 og 2 í kappingini vinna luttøku í Heimsmeistaraskapinum í Settlers, sum verður í Essen í Týsklandi 14.-16. oktober. Ikki færri enn 31 lond luttaka til hetta HM, eitt nú Japan, Taiwan, USA og Ísland. Ferðing til Essen og gisting í Essen er íroknað vinninginum.

FM verður í Bridgehúsinum í Havn leygardagin 24. sept. Spælt verður við altjóða reglum og verða tær útvíðkaðu útgávurnar av Settlers ikki nýttar. Man kann tekna seg við at senda ein teldupost við navn, búðstað og telefonnummar til settlers@kallnet.fo

Leggjast kann afturat, at luttakarinum mugu verða fyltir 18 ár, og at luttakaratalið er avmarkað.

Nýtt frá Bókadeildini:

# Úlvsbróður

**Úlvsbróðir er fyrsta bók av seks í bókarrøðini Krýnikur úr døkkari fortíð. Døkka fortíðin er fyri fleiri túsund árum síðan, tá fólk vóru veiðarar og savnarar**




"Tá eg var tíggju ár, ynskti eg mær ein úlv. Og ein boga og píl, og eitt hálsband við djóratonn í, sum steinaldarfólk. So vaks eg til, og mangt broyttist - men ikki so øgiliga nógv." Soleiðis sigur rithøvundurin, Michelle Paver, sum ongantíð misti hugin at granska livihátt og umstøður í steinøldini. Hon hevur sett seg sera væl inn í plantu- og djóralív, og hvussu fólk hava hugsað á teimum døgum. Hetta setur eisini sín dám á bók hennara Úlvsbróðir, sum, umframt at verða sera spennandi, verður mett at vera eitt skrivligt valaverk. Høvuðspersónurin Torak verður hetja, ikki tí hann vil, men av neyð. Hann hevur sæð pápan verða dripnan av einum illum anda í bjarnarkroppi, sum verður óndari og óndari, sum tíðin líðir. Pápin megnar í deyðsløtuni at greiða Toraki frá tí, hann noyðist at gera fyri at bjarga øllum: hann noyðist eina langa ferð at lokka bjørnina til fjallið hjá heimsandanum fyri at gera enda á henni.

Úlvsbróðir kom út í Onglandi í 2004 og hevur fingið sera góð ummæli og er nógv lisin. Og longu nú kunnu børn og ung ogna sær bókina á føroyskum.

Michelle Paver hevur áður skrivað til vaksna lesaran, men við hesum bókunum er hon vorðin kend um allan heim. Tá ið enska forlagið slapp at lesa bókina, skrivaðu tey alt fyri eitt sáttmála við rithøvundan um seks bøkur, sum snúgva seg um Torak og lívið sum veiðari og savnari í Norðurevropa fyri fleiri túsund árum síðani. Síðani eru rættindini til bókarøðina seld um allan heim. Bergur Rasmussen hevur týtt Úlvsbróður úr enskum.

**ave**

# Nýggjastu bøkurnar frá Bókadeildini

**Lucy Cousins: Ha-ha, Malja**




Bókin til tey minstu er um músina Malju og vinir hennara.

Ein klaffabók sum fortelur um, hvat fær Malju og vinirnar hjá henni í gott lag. Niels Jákup Thomsen hevur týtt bókina úr enskum, hon er ætlað børnum frá 0-3 ár og kostar 45 kr í bókhandlum.

**Franz-Joseph Huainigg: Føtur mínir eru koyristólurin**




Ein myndabók um gentuna Margit, sum má brúka koyristól sum føtur, men als ikki vil hava nakran at taka synd í sær.

Margit sleppur til handils fyri mammu sína og er ógvuliga errin. Hennara handilstúrur er nógv øðrvísi enn hjá einum við ongum breki, og so er hann eisini spennandi og hugvekjandi.

Ein viðkomandi bók um at bera brek, um tolsemi, hjálpsemi og at viðurkenna at hóast tú ber brek, hevur tú tað líka stuttligt og líka keðiligt sum hini.

Lydia Didriksen týddi úr týskum. Bókin er 24 bls. Verena Ballhaus hevur myndprýtt og hon fæst til keyps fyri 95 kr.

**Annika Thor: Kitlar í búkinum Klumpur í hálsinum**

Bókin er sjálvstøðugt framhald av bókini Reytt hjarta Bláur firvaldur, ið er um Alvu, sum verður so ótrúliga góð við Viktor.

Í hesari bókini eru tey aftur komin í skúla og eru fegin um at hittast aftur, men fer kærleikin at halda teirra millum?

Bókin er 121 bls. við svørt/hvítum vøkrum myndum og er væl egnað til 7-9 ára gomul børn. Karl N. Hansen hevur bókina, og hon kann keypast fyri 140 kr í bókhandlum.

**Eoin Colfer. Artemis Fowl II Niður og norð**

Onnur bókin um kriminella flogvitið Artemis Fowl. Ein high-tech fantasy bók í besta James Bond stíli. Munurin er bert tann, at her eru tað tey fornisku, sum hava tøknligu vitanina og førleikarnar, og Artemis hevur brúk fyri teirra serkunnleika fyri at bjarga pápa sínum.

Sjálvur sigur Eoin Colfer, at hann altíð hevur verið hugtikin av, hvussu børn klára seg í løgnum umstøðum; hetta er afturvendandi evni í skaldskapi hansara, og umstøðurnar hjá Artemis, tá ið hann fer undir bjargingina, eru av sonnum løgnar.
Bergur Rasmussen hevur týtt úr enskum. Bókin er 285 bls, heft við klaffum og kostar 150 kr í bókhandlum.

# Fløguútgáva og konsert flutt

Konsertin hjá Lenu í Krudttønden er flutt til týsdagin 18. september kl. 21.00. Hetta hendur í sambandi við at útgávudagurin av eini nýggjari og betri útgávu av "Can't Erase it" á danska marknaðinum er fluttur til 17. oktober.

Nýggja útgávan av "Can't Erase it " er bygd á føroysku útgávuna, Óli Poulsen hevur saman við Lenu og Niklas arbeitt 3 vikur í summar, við at gera fløguna klára. Umframt onkrar broytingar er okkurt nýtt lag á henni.